**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Tlf. 222733 finnurj@post.olivant.fo*
Limirnir koma saman í Losjuni mikukvøldið 20. okt. kl. 19.

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnukvøldið kl. 18 er møti við Oasubrøðunum.

**Listasavnið á Sandi**
er stongt allan oktober mánaða, men letur upp aftur í november. Frá november til mai er bara opið sunnudag kl. 14-16. Bólkar o.o., sum vilja gera seravtalu um aðrar tíðir kunnu ringja á tlf. 211924 ella 361617 í góðari tíð frammanundan.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará.*
*Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.*
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18.*
*Øll eldri eru vælkomin*

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
*Opið er: Mánadag, týsdag og mikudag frá kl. 15-18.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
*dagtilhaldid@post.olivant.fo*
*Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30 – 17.30*
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.
Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
Er opið týsdag og hósdag frá kl. 15-18. Øll eru vælomin.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
*Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í líkaviku frá kl. 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.*
Ogur møtast aftur í ólíka viku til somu tíð og sama stað.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella nevndarlimunum.

**BERIN – Sjálvhjálparbólkar**
fyri børn og ung, ið hava mist foreldur ella systkin. info@berin.fo - www.berin.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun!
Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf

**Spælistovan**
í Margarinufabrikkini. Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9-12 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Giktafelag Føroya**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
100 Tórshavn. Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13 til 16.

**Lymfødemfelagið**
Tlf. 225224
Íslandsvegur 10 C, Tórshavn
Postrúm 2113, FO-165 Argir

**Cøliaki Felag Føroyar**
*Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783. Postboks 3120, 110 Tórshavn, hjartafelag@hjartafelag.fo*

**Kvinnuhúsið**
Skrivstovan er opin gerandisdagar frá kl. 10-17. Tlf. 317200 svarar alt samdøgrið.
post@kvinnuhusid.fo
www.kvinnuhusid.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
MBF-Húsið - Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð

## Diamantbrúdleyp
Hósdagin 28. okt. kunnu Mása og Jógvan Tróndheim, Klaksvík, hava diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18, har øll eru vælkomin. Tey, ið ynskja at gleða diamantbrúðarparið henda dagin, verða biðin um at siga frá innan 20. okt. á telefon 456822.

## Silvurbrúdleyp
Týsdagin 23. nov. hava Osla og Christian Andreasen, Mikladali, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Avhaldshúsinum í Mikladali leygardagin 20. nov. kl. 19. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tel.: 457049 ella 581865 áðrenn 5. nov.

## 90 ára føðingardagur
18. okt. *fylti* Alvilda Bærendsen, ættað úr Norðradali, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 23. okt. kl. 11-16 á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin. Øll eru vælkomin.

## 80 ára føðingardagur
21. okt. verður Frithiof Petersen, Kollafjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum leygardagin 23. okt. frá kl. 12-18. Øll eru hjartaliga vælkomin

## 70 ára føðingardagur
Leygardagin 23. okt. fyllir Jósvein Hovgaard, í Porkeri, 70 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá soninum Jan, á Hólinum 9, frá kl. 18. Øll eru vælkomin!

## 70 ára føðingardagur
Hósdagin 4. nov. fyllir Tórjun Dahl Jacobsen, Fuglafjørður, 70 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 6. nov. frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 60 ára føðingardagur
Mánadagin 25. okt. fyllir Ruth Midjord, Hvalba, 60 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 23. okt. frá kl. 12-17. Øll eru vælkomin.

## 60 ára føðingardagur
Mánadagin 1. nov. fyllir Gerhard Lognberg 60 ár. Dagurin verður hildin í Samljóð leygardagin 6. nov. kl. 19. Øll eru vælkomin.

## 50 ára føðingardagur
10. nov. fyllir Georg eystan Á 50 ár. Dagurin verður hildin 13. nov. kl. 19. Tey ið vilja við í gildi, verða biðin um, at boða frá, áðrenn 6. nov. á tel.: 272509.

## Brúdleyp
Leygardagin 23. okt. giftast Christina av Reyni, Tórshavn og Leif á Bøgarði, Kaldbak. Vígslan verður á Auto Service kl. 12 , eftir vígsluna eru øll vælkomin til brunch. Veitsla verður fyri innbodnum kl. 19.

Leygardagin 30. okt. kl. 18 giftast í Sandavágs kirkju Sólja Jóanisdóttir, Sandavágur, og Heini Hanusarson, Kollafjørður. Veitslan verður fyri innbodnum í SÍF-húsinum eftir vígsluna.

Leygardagin 6. nov. kl. 16. giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík. Gudrun Bláskor Húsar og Jákup Samson Klaksvík. Vælkomst verður í Skálanum kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 13. nov. giftast Martha Isabella T. Thomassen og Birgir Lauritsen, Miðvágur. Vígslan verður í Miðvágs kirkju kl. 14. Opið hús verður í SÍF húsinum í Sandavági frá kl. 19. Tey ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 23. okt. Martha tlf. 257329 - Birgir tlf. 269797, heima tlf. 332433 ella á teldupost: martha-birgir@hotmail.com



Leygardagin 4. des. giftast Jónvá E. Royðutoft, Strendur og Jónleif Eliasen, Tórshavn. Vígslan verður í Kelduni í Skálafirði kl. 13. Veitslan verður í bygdarhúsinum á Strondum kl. 18. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, vera biðin, at siga frá innan 20. nov. á tel.: 747825-447825 (Jónvá) ella 591310 (Jónleif)

# Heilsan



**Góði Hákun**
Hjartaliga tillukku á 10 ára føðingardegnum.
**Ynskir abbi**

## Tín stóri dagur

## Takka í Sosialinum

www.taks.fo
TAKS

Broyting í rentustuðulslógini

**Rentustuðulin steðgaður, um lánsupplýsingar vanta**

Orsakað av broytingum í lógini um rentustuðul, verða øll tey, sum ikki enn hava latið TAKS upplýsingar um bústaðarlán og matrikkulnummar, biðin at gera hetta innan 8. november 2010. Tey, sum ikki hava latið upplýsingarnar inn innan 8. november 2010, missa rentustuðulin fyri 2010.

TAKS sendi í vár saman við Sjálvuppgávuni bræv út, har biðið var um útgreinandi upplýsingar um lán hjá skattgjaldarunum. Brævið skal sendast aftur til TAKS við umbidnu upplýsingunum.

Tey, sum ikki hava brævið tøkt, kunnu fáa avrit sendandi við at venda sær til TAKS.

Spurningar hesum viðvíkjandi kunnu stílast til TAKS á telefon 352600.

Meira kunning um broytingarnar í lógini um rentustuðul fæst á www.taks.fo



TAKS
14. oktober 2010